


# 4 SPENNANDI STØRV HJÁ FORMULA.FO

FORMULA Media er nýggj eind hjá Formula.fo, sum veitir framkomnar heildarloysnir til fyritøkur og stovnar innan teldutøka miðling. Formula Media er ein samanrenning av virkisøkinum hjá Formula.fo og dóttirfelagnum Zenit innan loysnir til journal-, skjala- og málsviðgerð umframt skipanarloysnir av ymsum slagi til internetið.

FORMULA Media tekur støði í hesum skipanum við tilhoyrandi tænastuveitingum: i2.net Content Management til heimasíður, heimanet o.t., Public 360° til ESDH-loysnir, Microsoft SharePoint til fjøltáttaðar og integreraðar virkisloysnir. Í samstarvi við aðrar eindir hjá Formula.fo fáa vit veitt heildarloysnir til ein og hvønn KT-tørv hjá fyritøkum og stovnum.

FORMULA Media, sum í løtuni hevur 5 fólk í starvi, víðkar nú sítt virksemi og søkir tí eftir virkisfúsum, tænastuhugaðum og miðvísum fólki til hesi størv:

## > Samskipari

Tú fert at hava dagligu leiðsluna av FORMULA Media um hendi við denti á at samskipa veitingar og stýra uppgávutilgongdini fyri økið, soleiðis at kundans tørvur kemur í hásæti. Tú verður ambassadørur hjá kundanum innanhýsis á FORMULA Media og okkara mótvegis kundanum.

Tú dugir at hava nógvar bóltar í luftini í senn uttan at missa yvirlitið og hevur góðar leiðslueginleikar og samstarvsevni. Tú mást vera miðvísur og góður at røkka úrslitum.

## > Projektleiðari

Tú fert at stýra menningarprojektum og størri veitingaruppgávum hjá FORMULA Media umframt aðrastaðni á Formula.fo. Eisini fert tú at samskipa menningaruppgávur saman við forritamennarum, kundanum og øðrum pørtum í menningartilgongdini.

Tú dugir at hava nógvar bóltar í luftini í senn uttan at missa yvirlitið, og hevur góðar leiðslueginleikar og samstarvsevni. Tú mást vera miðvísur og góður at røkka úrslitum. Harafturat mást tú duga væl at gera lítarleyst skrivligt tilfar og vera røkin.

## > Kundaráðgevi

Tú fert at hava ábyrgd av dagliga samskiftinum við okkara kundar. Tú fert at røkja kundasambond - bæði verandi og nýggjar kundar. Tú fert at ráðgeva kundum okkara við støði í kundans tørvi og okkara veitingarmøguleikum og annars í tí dagliga vegleiða og veita dygdargóðar tænastur til okkara kunda, t.d. support til okkara forritabrúkarar.

Tú dugir at skilja og lýsa kundans tørv við støði í okkara veitingarmøguleikum. Tú ert tænastuhugaður og hevur góðan hug at samskifta við kundar okkara. Tú ert miðvísur og góður at røkka úrslitum.

## > Ráðgevi í virkisgongdum

Tú hevur dagliga ábyrgd av at samskipa og standa fyri verkseting av loysnum innan journal, skjala- og málsviðgerð, og herímillum ábyrgd av at greina og ráðgeva um virkisgongdir við støði í kundans tørvi og okkara veitingarmøguleikum.

Tú dugir væl at seta teg inn í virksemið hjá fyritøkum og stovnum, sum eru okkara kundar, við tí endamáli at tryggja veiting av dygdargóðum ESDH-loysnum. Tú dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt og at lýsa og leggja fram greiningar og tilmæli um loysnir. Tú mást vera miðvísur og góður at røkka úrslitum eins og hava førleika til at gera lítarleyst skrivligt tilfar.

## Alment um størvini

Dentur verður lagdur á, at tey, ið sett verða í starv, hava viðkomandi persónligar eginleikar, royndir og útbúgving. Tað er ikki neyðugt at hava serligan tøkniligan kunnleika til tær telduskipanir, sum FORMULA Media veitir, tí haldgóð upplæring verður veitt innan økið. Umráðandi er tó at tú hevur hug og førleika til at seta teg inn í skipanirnar. Somuleiðis verður dentur lagdur á, at tú dugir at arbeiða sjálvstøðugt og at skapa dygdargóð úrslit.

Vit bjóða eitt fjølbroytt og mennandi starvsumhvørvi, sum gevur tær møguleika fyri persónligari og fakligari menning. Vit bjóða løn og setanartreytir eftir avtalu og somuleiðis góðar møguleikar fyri eftirútbúgving.

Spurningar um størvini kunnu setast Edvardi S. Remberg, stjóra á Menningardeildini, ella Limberg Michelsen, forritara. Umsóknarfreistin er 12. mars 2007. Umsóknirnar skulu sendast Edvardi S. Remberg, Formula.fo, við hesi eyðmerking: "Starvsumsókn".

formula.fo

Formula.fo telist millum størstu privatu teldufyritøkur í Føroyum, eins og Formula.fo hevur týðandi virksemi uttanlands. Formula.fo er einasta KT-fyritøka í Føroyum, sum er Microsoft Gold Certified Partner. Formula.fo veitir heildarloysnir til ein hvønn tørv innan telduøkið. Á Formula.fo starvast í løtuni gott 70 fólk.